ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Tey siga, at tað verður so ræðuligt, um Hillary vinnur, so tey ræða fólk frá at velja hana*

*Bill Clinton*

# Einki valevni so illa viðfarið sum Hillary

**Bill Clinton er í øðini inn á fjølmiðlarnar og onnur, tí tey royna at trýsta Hillary út úr valstríðnum, sigur hann**



*Bill og Hillary Clinton á valfundi í South Dakota í gjár*

*Mynd: Polfoto*

- Eg havi ongantíð vitað, at eitt valevni hevur verið viðgjørt við so lítlari virðing, segði Bill Clinton sambært sjónvarpinum ABC News, tá hann helt røðu á einum uppstillingarfundi í South Dakota í gjár. Hann vísti á, at tað var eingin, sum bað Edward Kennedy, Jesse Jackson ella Gary Hart taka seg burtur úr valstríðnum, tá teir royndu seg.

Politiskir eygleiðarar í USA eru á einum máli um, at Hillary Clinton hevur at kalla ongan møguleika at gerast forsetavalevni hjá demokratunum í heyst. Tíðarrit sum Times og Economist hava longu lýst Barrack Obama sum vinnara, og fleiri hava mælt Hillary til at gevast við valstríðnum. Samstundis verður dúgliga gitt, hvussu teir serligu valmenninir fara at atkvøða. Hetta nam Bill Clinton eisini við:

- Eg skilji tað ikki. Tað er stutt sagt heilt burturvið, sum tey plága og trýsta valmenninar til at taka avgerð, segði hann sambært CNN.

Hann vildi vera við, at amerikonsku fjølmiðlarnir hava gjørt lítið burturúr, tá Hillary hevur vunnið eitt val, og at endamálið er at forða fyri, at hon kann vinna uppstillingina.

# Sleppur hon út í morgin?

**Í morgin rennur tað triðja fimm ára varðhaldsskeiðið hjá Aung San Suu Kyi út**

Síðani 1991 hevur Aung San Suu Kyi sitið innistongd í húsum sínum í Rangoon. Av og á hevur hon verið úti, og nú skal hernaðarstýrið gera av, um hon skal verða sitandi í húsavarðhaldi, ella um hon skal sleppa út. Tí morgin rennur tað triðja varðhaldsskeiðið út.

Enn eru eingin tekin komin, sum benda á, at hernaðarstýrið ætlar at lata hana sleppa úr húsavarðhaldinum, og hennara vinfólk og stuðlar vænta eisini, at varðhaldið verður endurnýggjað.

Í morgun komu seks løgreglubilar til húsini hjá Tjóðskaparliga Demokratiska Flokkinum, sum hevur boðað frá, at hann fer at skipa fyri einari kravgongu til frama fyri Aung San Suu Kyi. Tíðindastovurnar vistu eisini at siga frá, at bæði hermenn og løgreglumenn stóðu á varðhaldi uttan fyri hús hennara í morgun.



*Aung San Suu Kyi. Sleppur hon úr húsavarðhaldinum nú, ella verður hon framhaldandi avbyrgd?*

*Mynd: Polfoto*

STUTT SAGT

## Funnið kendan gravstað



Eftir at hava leitað í fleiri ár heldur egyptiski fornfrøðingurin Zahi Hawass seg nú hava funnið gravstaðin hjá teirri kendu drotningini Kleopatru. Einar 50 kilometrar vestan fyri býin Alexandria er hann komin fram á standmyndir av Kleopatru og sambúgva hennara, rómverska herovastanum Marcus Antonius. Herumframt hava hann og hansara menn funnið fleiri myntir við mynd av teirri kendu drotningini. Antonius og Kleopatra fingu trý børn, men tey bæði valdu at beina fyri sær, eftir at tey høvdu tapt ein bardaga við rómverska herovastan Octavianus við Actium í árinum 31 fyri Kristi føðing. Octavianus gjørdist seinni rómverskur keisari undir navninum Augustus.

Mong munnu hava sæð tann kenda filmin um Kleopatru við Elizabeth Taylor og Richard Burton sum høvuðsleikarum.

## Gevst Hillary!

Fyrrverandi amerikanski forsetin Jimmy Carter telist nú millum teirra, sum vilja hava Hillary Clinton at gevast við royndini at gerast forsetavalevni hjá demokratiska flokkinum. Carter ásannar, at Hillary hevur fullan rætt til at halda fram til tað seinasta uppstillingarvalið tann 3. juni og á sjálvum uppstillingarfundinum hjá flokkinum seinni í summar, men hann heldur ikki, at tað tænir nøkrum endamáli. Tann 83 ára gamli Carter er ein av teimum serligu valmonnunum, sum hava atkvøðurætt á floksfundinum, og hann hevur boðað frá, at hann fer at velja Barrack Obama.